## Reglur viðvíkjandi Grandprix-kappingini – vaksin

### §1 Kappingarsnið

Stk. 1

Spældar verða í minsta lagi 5 kappingar. Miðað verður ímóti, at hvørt felag skipar fyri í minsta lagi einari kapping. Eitt felag kann skipa fyri fleiri kappingum.

Feløgini kunnu sjálvi avgera navnið á kappingini - eitt nú "Trygd Open".

Stk. 2

Kappingarnar verða lagdar eftir forritinum, sum Badmintonsamband Føroya, hereftir nevnt BSF, hevur valt.

Stk. 3

Um fleiri enn fimm leikarar eru tilmeldaðir, so verða kappingarnar leiktar við innleiðandi bólkaspæli og eftirfylgjandi einum endaspæli. Um fimm leikarar ella færri eru tilmeldaðir, verður kappingin skipa við einum bólki. Til hvørja kapping verður ein vinnari funnin í øllum rekkjum.

Stk. 4

Um kappingin skal geva stig, so skal kappingin vera í tráð við §1, stk. 1-3 og §2.

Stk. 5

Fimm tey fyrstu, í ávikavist harra- og kvinnurekkjuni, fáa grandprix-stig eftir §3.

### §2 Innbjóðing og avgreiðsla av grandprix kappingum

Stk. 1

Ábyrgdarhavandi felag syrgir fyri, at innbjóðingin verður gjørd sambært frymli frá BSF. Í innbjóðingini skal standa: tíð, stað, luttøkugjald, heiðursmerki, nær freistin at melda til er, hvør er kappingarleiðsla í høllini, hvør hevur ábyrgdina av at leggja kappingina, teldupostur og telefonnummar á kontaktpersóni í sambandi við avboð.

Stk. 2

Leikararnir melda til hjá egnum felag. Felagið sendir síðani eina samlaða tilmelding fyri felagið, til felagið, sum skipar fyri kappingini. Felagið, sum skipar fyri kappingini, sendir síðani samlaða tilmelding til Kappingarnevndina hjá BSF. Á tilmeldingarlistanum frá feløgunum til BSF skal standa: Navn, rekkja, føðidato- og ár, har leikarin ynskir at luttaka,

Stk. 3

Tá ið freistin er farin verður latið aftur fyri tilmeldingum, men tað er møguligt at sleppa á bíðilista, so til ber at luttaka, um okkurt avboð kemur. Bíðilistin dettur burtur á midnátt hósdagin undan hvørjari kapping. Undanskipanin kann gera, at nýtt lutakast verður, og tí kann verða neyðugt, at kappingin verður løgd av nýggjum.

Stk 4.

Upp til fýra leikarar verða undanskipaðir (seedaðir) eftir tal av tilmeldaðum.

Undanskipanirnar verða gjørdar við støði í ranglistastigunum, og er javnt í ranglistastigum, ger kappingarnevndin í BSF av, hvussu undanskipanin verður.

Stk. 5

BSF hevur ábyrgdina av, at  kappingin við vegleiðandi tíðum er á facebook síðuni hjá Badmintonsambandi Føroya seinast 5 dagar undan kappingini.

Stk. 6

Ábyrgdarhavandi felag skal alla kappingina hava eina kappingarleiðslu til staðar í høllini, sum hevur ábyrgdina av, at kappingin koyrir sambært kappingarreglunum, og at alt runt í høllini fyrigongur róliga.

Stk. 7

Teljari við talvu skal vera á øllum banum. Ábyrgdarhavandi felag skal syrgja fyri, at so er.

Stk. 8

Leikararnir hava sjálvir ábyrgdina av at kanna, um dómaraseðilin er rætt útfyltur, vinnandi leikari letur dómaraseðilin til dómaraborðið.

**§3 Luttøka**

Stk. 1

Grandprix-kappingin er fyri leikarar í feløgum undir BSF. Í A-rekkjuni hjá kvinnum og monnum, kunnu hægst 16 leikarar luttaka í hvørjari kapping.

Kappingarnevndin, saman við BSF, kann loyva gestaspælarum at luttaka. Ein gestaspælari er leikari, sum ikki hevur bústað í Føroyum.

Um gestaspælari luttekur í GP kapping, kann verða víkt frá luttakaratalinum á 16 í A bólkinum. Um ivamál er um, hvussu Gestaspælari skal undanskipast, kann Kappingarnevndin ráðføra seg við Landsliðsvenjaran.

Gestaspælari, sum ikki er limur í felagi undir BSF, fær hvørki GP ella ranglistastig, og fella stigini tí burtur.

Stk. 2

Kappingarnevndin hjá BSF kann geva undantaksloyvi (Wildcard) til spælara at spæla í A bólkinum, um spælarin vegna skaða og líknandi, ella uppihald uttanlands, ikki hevur havt møguleika at lúka krøvini fyri at spæla í A bólkinum. Hetta skal altíð hvíla á ítróttalig avrik hjá leikaranum, um ivamál eru, skal Kappingarnevndin ráðføra seg við Landsliðsvenjaran og venjaran hjá avvarandi felag.

Við uppihald uttanlands verður eitt nú meint við at fjakka, skúla uttanfyri Føroyar og tílíkt.

Leikari, sum kemur uttanlanda frá, og sum ikki er limur í felagi undir BSF, fær hvørki GP ella ranglistastig. Um ivamál er um, hvussu hesin leikari skal undanskipast, kann Kappingarnevndin ráðføra seg við Landsliðsvenjaran.

Leikari skal sjálvur søkja um wildcard, umsóknin skal sendast til kappingarnevndina hjá BSF.

Stk. 3

Fyri at luttaka í kappingini fyri vaksin krevst, at leikari er í minsta lagi fylt/-ur 15 ár áðrenn 1. januar tað árið, ið kappingarárið byrjar.

Stk. 4

Um ein leikari er ungdómsleikari, skal hendan/hesin, umframt kravið í §3, stk. 3, eisini luttaka í GP í U17A í somu kapping, fyri at luttaka í kappingini ~~hjá~~ teimum vaksnu.

Stk. 5

Leikari í GP-vaksin skal í minsta lagi luttaka í 3 GP-kappingum í kappingarárinum, fyri at tað skal telja við í endaligu GP-støðuni ta kappingarárið.

**§4 Stig fyri Grandprix**

Stk. 1

Aftaná hvørja kapping, sum verður hildin sambært §1 og §2, verða stig fyri grandprix givin.

Stk. 2

Stig fyri grandprix verða givin til 5 teir bestu harrarnar og 5 tær bestu kvinnurnar, og verða tey givin soleiðis:

nr. 1 fyrsta pláss fær 50 stig

nr. 2 annað pláss fær 40 stig

nr. 3 triðja pláss fær 30 stig

nr. 4 fjórða pláss fær 20 stig

nr. 5 fimta pláss fær 10 stig

Stk. 3

Í so fall, at leikarar enda á einum deildum 3. plássi - fær hvør leikari 30 stig. Sama er galdandi fyri 5. plássið.

Stk. 4

Tá ið samlaða støðan er uppgjørd, telja bara 4 tær hægstu raðfestingarnar við.

Stk. 5

Í so fall, at fleiri leikarar hava líka nógv stig, so vinnur tann leikarin, sum hevur flestar topplaseringar. Um so er, at tað framvegis er javnt, vinnur tann leikarin, sum hevur vunnið flest innanhýsis dystir. Er tað framvegis javnt, so vinnur tann leikarin, sum vann síðsta innanhýsis dystin.

Stk. 6

BSF gevur heiðursmerki/steyp til 3 ovastu harrarnar og 3 ovastu kvinnurnar aftaná GP5.

**§ 5 Skipan av ranglistastigum**

Stk. 1

BSF ger eina skipan út frá teimum ranglistastigunum, sum leikarin hevur vunnið sær. Ranglistastigini verða roknað út frá seinastu fimm fylgjandi GP-kappingum, sum hava verið hildnar. Tað eru bert tær fýra bestu plaseringarnar av hesum seinastu fimm kappingunum, sum telja við.

Stk. 2

Ranglistastigini verða brúkt til at avgera, hvussu A-rekkjan verður mannað við 16 teimum bestu leikarunum. Ranglistastigini verða eisini brúkt til undanskipan.

Er javnt millum fleiri leikarar á ranglistanum, verður fyrst hugt at vunnum dystum, næst settum og síðani vunnum bóltum í kappingini. Er enn javnt, so verður lutakast um plasering á ranglistanum.

Stk. 3

Ranglistastig fyri grandprix verða givin soleiðis fyri bæði menn og kvinnur:

A-rekkjan:

1. pláss: 98 stig

2. pláss: 73 stig

3. og 4. pláss: 44 stig

5. til 8. pláss: 26 stig

9. til 16. pláss: 13 stig

B-rekkjan:

1. pláss: 22

2. pláss: 16

3. og 4. pláss: 10 stig

5. til 8. pláss 6 stig

9. til 16. pláss: 3 stig

17. til 24. pláss: 1 stig

C-rekkjan:

1. pláss: 5 stig

2. pláss: 3 stig

3. og 4. pláss: 2 stig

5. til 24. pláss 1 stig

**§6 Skipan í rekkjur**

Stk. 1

Tað kunnu vera upp til tríggjar rekkjur fyri vaksin hjá monnum og kvinnum. Talan er um rekkju A, B og C.

Stk. 2

A-rekkjan kann rúma upp til 16 leikarar til hvørja kapping. Ranglistastigini avgera, hvørjir leikarar kunnu vera við í A-rekkjuni. Teir 16 tilmeldaðu leikararnir við hægstu ranglistastigunum eru við í A-rekkjuni. Víst verður til §5, stk 2.

Stk. 3

B-rekkjan kann rúma upp til 24 leikarar til hvørja kapping. Her spæla bæði leikarar, sum tilmeldað seg til B-kappingina, men eisini spælarar, sum hava tilmeldað seg til A-rekkjuna, men sum ikki hava ranglistastig til at koma í A-rekkjuna.

Stk. 4

C-rekkjan kann rúma upp til 24 leikarar, og er ætlað til leikarar, sum ynskja eina stuttleikakapping. Ranglistastigini í C bólkinum verða bara brúkt til at leggja teirra kapping.